# Kvinnur raðfesta øðrvísi

*Høvdu kvinnurnar verið við í bygdarráðnum í Vestmanna í áttatiárunum, vórðu íløgurnar øðrvísi raðfestar. Hesi árini, kvinnulistin hevur stýrt, hava í stóran mun verið brúkt til at gjalda skuld aftur*

Edvard Joensen



*Íløgur hava ikki fyri neyðini at víkja fyri skuld, siga Mia Petersen og Hervør Durhuus*
**Mynd: Jens Kr. Vang**

**Vestmanna:** Seinasta valskeið er skuldin hjá Vestmanna Kommunu minkað við 14 milliónum. Tá verandi bygdarráð tók við, var kommunuskuldin fýra álíkningar, meðan hon í dag er góðar tvær. Tó er skattainntøkan vaksin úr 20 til 25 milliónir.

Hóast tað hava verið trongar tíðir í Vestmanna, síðan kreppan tók seg upp, er einki fólk flutt úr bygdini av týdningi. Vestmenningar tóku tolnir við tí, sum kom, og stóðu saman um at gjalda tað aftur, teir skyldaðu. Treyðugt so. Onkur fór, men fleiri eru afturkomin. Og arbeiðsloysið hevur ikki verið í Vestmanna, greiða bygdarráðslimirnir Hervør Durhuus og Mia Petersen frá.

Vit sita inni á kommunuskrivstovuni í Vestmanna. Har eru bara kvinnur inni. Tvær á skrivstovuni og tveir bygdarráðslimir. Menninir eru í kjallaranum, har ein teirra liggur undir brandbilinum og hjálpir upp á okkurt smávegis.

Tá skuldin hjá Vestmanna Kommunu var upp á tað mesta, tóku kvinnurnar seg saman og stillaðu upp á kvinnulista, sum nú hevur stýrt bygdini trý valskeið. Hetta seinasta valskeiðið hevur kvinnulistin havt fýr av sjey bygdarráðslimum.

Men tað skal ikki vera, siga Mia Petersen og Hervør Durhuus við ein munn, at nakar skal hava ta fatan, at teir tríggir menninir í bygdarráðnum ikki eru samstarvssinnaðir við kvinnurnar. Hóast teir eru valdir á øðrum lista, hevur samstarvið verið fyrimyndarligt, leggja tær dent á.

At afturgjald av skuld hevur verið so høgt raðfest, hevur gjørt, at ávísar íløgur hava verið noyddar at bíða. Tí er neyðugt nú at fara at hugsa um fleiri íløgur, siga tær báðar kvinnurnar í bygdarráðnum í Vestmanna. Íløgukvotan hjá Vestmanna Kommunu verður komandi ár 4,7 milliónir, og tær røkka ikki til alla verðina.

Men nógv er at brúka tær til, siga tær báðar. Barnagarðinum hava vestmenningar bíðað leingi eftir. Hann hevur annars verið eitt aðalmál hjá kvinnulist-anum, men realistiskar sum tær eru, er hann eisini settur aftur um fyri at kunna gjalda niður. Men nú kemur hann, lova tær. Vestmanna hevur dagrøkt, og har er normeringin hækkað úr 45 til 62 pláss.

Eitt annað stórmál er nýggj vatnveiting. Hon er alneyðug, og farið verður undir hana sum skjótast. Tó verður hon ikki gjørd eftir einum ári, siga tær báðar Mia Petersen og Hervør Durhuus. Til tess er hon ov kostnaðarmikil. Einar sjey milliónir vænta tær, hon fer at kosta.

Kloakkirnar í bygdini eru ikki í góðum standi. Gamlar, og í støðum eitt sindur viðtiknar. So har skulu brúkast pengar í komandi tíð. Ætlanir eru um vetrarfriðing, sum krevur hegn um alla bygdina. Tað fer helst at kosta út móti hálvari triðju millión, verður mett.

Eitt annað mál er at fáa savnað alla heilsutænastuna í kommununi. Sum er eru viðurskiftini ikki góð á tí økinum. Lækni, tannlækni, jarðarmóður og so framvegis eru í Vestmanna. Men trupulleikin er í mongum førum, at hølini, tey hava, eru illa atkomilig.

Tær báðar, Mia og Hervør halda ikki, at tað verður neyðugt at steðga nøkrum, fyri at fáa annað framt í komandi valskeiði. Tað er bara at duga at brúka pengarnar rætt, siga tær. Men tað verður stuttligari hjá nýggja bygdarráðnum at taka við, enn tað var hjá tí verandi, eru tær samdar um. Tí tað er lættari at arbeiða við eini skuld upp á góðar tvær álíkningar heldur enn fýra.

Men tað er sjálvandi ikki vist, at tær yvirhøvur verða í komandi bygdarráði. Fyrst skulu tær stillast upp og síðani veljast.

Eingin endaligur listi er gjørdur, siga tær. Tó leggja tær aftrat, at tær hava bara sitið eitt skeið og hava tí skyldu at taka við vali, um tær verða settar á listan og valdar.

Og tær taka aftur í aftur, at tað er bæði stuttligt og spennandi at sita í bygdarráðnum, tá úrslitini eru so sjónsk, sum tey hava verið seinasta valskeiðið.

# Heilsumiðstøð á Strondum

*Sjóvar Kommuna hevur bygt nýggja heilsumiðstøð, sum samstundis er goymsluhøli og brandstøð*

**Edvard Joensen**

**Strendur:** Nýggj heilsumiðstøð verður tikin í nýtslu á Strondum fyrsta dagin. Hølini eru liðug og í løtuni verður útgerð hjá læknanum og sjúkrasystrunum sett upp.

Nýggja heilsumiðstøðin fer at hýsa læknavitaluhølum, heimssjúkrasystrum og skrivstovuni hjá sjúkrakassanum í Skála læknadømi í ovaru hæddini.

Ì niðaru hæddini er rúm til brandbilin og brandmenninar at vera í, umframt at kommunan hevur goymsluhøli kjallaranum.

Eivind Jacobsen, bygdarráðsformaður, er væl nøgdur við húsini. Sjóvar Kommuna hevur fingið væl burturúr, heldur hann. Samlaði kostnaðurin fyri heilsumiðstøðina við innbúgvi og allari útgerð fer liggja um knappar tvær milliónir, sum bygdarráðsformaðurin heldur vera væl sloppið.

Umstøðurnar vóru einki serligar frammaundan, sigur Eivind Jacobsen. Nógv útgerð hjá kommununi varð hýst í ymsum neystum, umframt at neyðugt var at hava okkurt liggjandi úti. Brandbilurin stóð í einum leigaðum bilskúri.

Læknin fær rættiliga nógv betri umstøður, nú tvey nýggj viðtaluhøli verða gjørd. Eisini er góð skrivstova til læknaskrivaran umframt rúmligt bíðirum. WC er bæði vanligt og handicap-wc í bíðirúminum.

Av øðrum, sum Sjóvar Kommuna hevur í gongd í løtuni nevnir bygdarráðsformaðurin vatn og kloakkveitingar, sum arbeitt verður við. Kommunan var komin afturút við kloakkini, sigur Eivind Jacobsen. Tað er nú hjálpt munandi upp á tað sigur hann.

Vatnveiting arbeiðir kommunan eisini við. Leiðingar eru lagdar, og nýggj byrging verður gjørd til uppsamling. Eisini skal reinsiverk setast upp.

Vatnið verður tikið úr keldu, sum gevur rættiliga væl, sigur hann. Hendan íløgan fer at kosta nakrar milliónir, sigur Eivind Jacobsen.

Eivind Jacobsen sigur, at Sjóvar Kommuna hevur tosað eitt sindur við teir hinumegin fjørðin, Runavíkar- og Nes kommunurum at lata teimum vatn, tá á stendur.

Eystan fyri er nokk av vatni, sigur Eivind Jacobsen, men trupulleikin har er reinsingin.

Tað er eingin trupulleiki, sigur Eivind Jacobsen, at leggaj rør eftir botni tvørtur um Skálafjørðin. Tey verða ikki longri, enn tað, kommunan longu hevur lagt, og so slepst undan at grava tey niður. Nøkur søkk klára tað.

Inni á Hulki hevur Sjóvar Kommuna sprongt nakað væl í berginum oman fyri fiskavirkið Vaðhorn. Grótið var nakað leyst, og fyri at tryggja arbeiðsøkið, er ein breið hill sprongd í klettin, soleiðis at tað leysa grótið ikki skal detta niður á arbeiðsøkið.

Tað, sum sprongt varð burtur, er brúkt til ífyllu millum Langanes og bátahylin, sigur Eivind Jacobsen, umframt at ein pierur er gjørdur inni á Hulki. Soleiðis fekk kommunan eisini nyttu av hesi reinsingini, sigur hann.

Mett varð neyðugt við hesum grótkastinum, tí eitt sindur ófriðaligt var hjá smærri førum at liggja inni við Hulkin á ávísum ættum. Tað er tó ikki bara á Strondum, at vatnveiting verður løgd. Eisini vestan fyri verða lagdar vatnveitingar, sigur bygdarráðsformaðurin. Á Morskranesi verður veiting løgd úr eini keldu norðan fyri bygdina. Eisini Selatrað skal hava nýggja vatnveiting, og mett verður frægast at taka úr somu kelduni, sum Morskranes fær vatn úr, sigur Eivind Jacobsen, bygdarráðsformaður í Sjóvan Kommunu.



*Nýggja heilsumiðstøðin á Strondum*
**Mynd: Edvard Joensen**




# Luksusbilar við smáum prísum...

**Júst nú er tann nýggi Nubira Stationcar heimkomin - og teir italsku designararnir hava gjørt tað aftur. Nubira er nú flottari enn nakrantíð.**

**Útsjóndin er ikki tað einasta góða við Nubira. Bilurin er á tremur av hentari útgerð m.a. sentrallás, servostýring, el-rútar, eldrivin/hitaði síðuspegl, tónaðir rútar og viðlitaðir kúfangarar. Nubira Stationcar hevur harafturat eitt av størstu viðførisrúmum í mun til aðrar bilar í sama flokki (1.840 litrar við niðurløgdum setrum).**

**Sjálvandi fylgir 3 ára verksmiðjugaranti/100.000 km og 6 ára rustgaranti við Daewoo bilinum.**

**Komið inn á gólvið hjá Esmari Simonsen á Kambsdali og royn Nubira.**

**Nubira Stationcar úr bert 168.700 kr. Nubira Sedan úr bert 158.700 kr.**

**Vælkomin!**



**Matiz er ein fittur og handligur 5-hurða mini MPV við sentrallási, el-rútum og servostýring.**

Úr **99.985,-**



**Lanos 1,3 ella 1,5. Rúmligur og fjølbroyttur. (í klassa við Toyota Corolla).**

Úr **119.985,-**



DAEWOO GARANTI
3ár
ELLA 100.000 KM
6ár
MÓTI RUSTI

**Nubira Stationcar úr bert**
**168.700,-**
**Sum sedan úr 158.700,-**

DAEWOO
*- ein skilagóð avgerð!*

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29